## Falsaðu pengar

Norska løgreglan hevur avdúkað nakrar menn, sum hava gjørt ein hóp av følskum pengaseðlum. Úrslitið er, at nakrir menn eru tiknir í Noregi, men kanningin vísti, at teir høvdu samstarvað við fólk í fleiri londum so sum Týsklandi, Kroatia og Slovenia, og har eru fleiri fólk eisini tikin. Sambært Aftenposten hava menninir gjørt norskar pengaseðlar og evruseðlar. Hildið verður, at menninir hava gjørt minst eina hálva millión evruseðlar.

## Álvarsamt ferðsluóhapp á Strondum

Mánakvøldið var eitt álvarsamt ferðsluóhapp á Strondum, har ein ungur maður kom sera illa til skaða.

Tað var stutt fyri midnátt, at ein bilur við trimum ungum monnum í, fór niðan av vegnum beint við kirkjuna á Strondum.

Hált og krapi var á vegnum inni í bygdini, tá bilurin varð slongdur upp undir eina trappu og bóltaði oman aftur á vegin. Sjúkrabilar og løgregla kom á staðið, og ungu menninir vórðu fluttir á sjúkrahús. Serliga hjá tí eina veit sera illa við. Hesin sat á forsetrinum, meðan førarin og tann á baksetrinum sluppu hampiliga væl.

Av løgreglustøðini í morgun varð sagt, at rúsdrekka ikki var partur av óhappinum.

# – Vandamikið at koyra við góðum dekkum

**Tí bremsar man, so fær man ein bil upp í reyvina. Soleiðis sigur koyrilærarin Jóhannus Hammer, sum í gjár var partur av harmonikukrassjinum við Leynatunnilin**

FERÐSLA
Rólant Waag Dam
rolant@sosialurin.fo




*Heili fimm bilar vóru partar av einum harmonikukrassji við Leynatunnilin seinnapartin í gjár, har tíbetur eingin fólkaskaði var*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Jóhannus Hammer fór um fýratíðina seinnapartin í gjár koyrandi móti Leynatunlinum. Hann var nummar fýra í eini røð av bilum og tá hann sá, at bilarnir frammanfyri settu ferðina niður, so gjørdi hann tað sama.

– Eg sá bilin aftanfyri meg nærkast so hvørt eg setti ferðina niður. Men einaferð var eg komin so mikið nær bilunum frammanfyri, at eg noyddist at høgga bremsurnar í, og tá er tað eg fái bilin upp í reyvina, greiðir Jóhannus Hammer frá.

Hann er koyrilærari og leggur seg tí altíð eftir, at alt er í ordan við bilinum. Nú um veturin brúkar hann dýr og góð vetrardekk, og tí bremsaði bilurin eisini væl í gjár. Tað gjørdi bilurin aftanfyri ikki og úrslitið var, at hesin rendi beint upp í reyvina á bilinum hjá Jóhannus Hammer, slongdist yvir á hina breytina, og gjørdi skaða á ikki minni enn tríggjar mótkoyrandi bilar.

Í hálkuni seinastu dagarnar hava vit verið vitni til fleiri ferðsluóhapp. Møguliga høvdu vit kunnað verið okkurt teirra fyri uttan, um fólk vóru skødd ordiliga. Tí heitir hann á fólk, um at keypa sær ordilig vetrardekk, sum tó eru sindur dýrari enn tey vanligu.

– Brúki vetrardekk um veturin, og summardekk um summarið, eru boðini frá Jóhannus Hammer, koyrilærara. Hann leggur aftrat, at píkadekkini, sum tey flestu brúka, eru bara tey bestu, tá tað ísur á vegnum.

– Men hvussu ofta er tað, spyr hann?

Tí er tað ynski hjá Jóhannus Hammer, at fólk keypa sær ordilig vetrardekk við bleytari gummiblanding, sum hava betri vegtak enn onnur dekk.

# Harmonikukrassj við Leynatunnilin

**Ikki færri enn fimm bilar vóru um fýratíðina seinnapartin í gjár partur av einum ferðsluóhappi við Leynatunnilin, har tó eingin fólkaskaði var**

FERÐSLA
Rólant Waag Dam
rolant@sosialurin.fo

Tveir bilar høvdu kós móti Leynatunlinum. Brádliga endar aftari bilurin upp í reyvini á fremra bilinum, og sleingist so yvir á hini breytina, har tríggir aðrir bilar koma koyrandi.

Bilurin tekur í spegli á tí fremsta av hesum, og ber eisini við skermin aftan og kemur síðani at standa tvørtur um vegin. Næsti bilurin í røðini stoytir eisini saman við bilin, sum kom sleingjandi, og hesin fer síðani niðan av vegnum. Triðji bilurin í røðini brestur somuleiðis saman við henda ólukku bilin, og soleiðis gjørdust tilsamans fimm bilar partur av ferðsluóhappinum við Leynatunnilin.

Løgreglan segði í morgun, at hálka var orsøkin til óhappi. Helst hevur tað eisini nakað við tað at gera, at fólk ikki koyrdu eftir umstøðunum, men hvussu er og ikki, so stóðst ikki nakar fólkaskaði av óhappinum.

# Koyrir tú eftir umstøðunum eigur einki at henda

**Soleiðis sigur Fríðrikur Bláhamar, stjóri á Super Dekk í Havn. Hann sigur, at góð vetrardekk hava bleyta gummiblanding við nógvum lamellum, og at píkadekk uttan píkar og niðurslitin vetrardekk eru følsk trygd**

FERÐSLA
Rólant Waag Dam
rolant@sosialurin.fo

Allarbestu vetrardekkini eru tey, við bleytari gummiblanding og nógvum lamelum. – Hesi eru tey bestu í kava, sigur Fríðrikur Bláhamar, stjóri á Super Dekk í Havn.

Tað, sum fólk vanliga rópa heilársdekk, er í veruleikanum vetrardekk uttan píkar. Hesi selja tey nógv av í Føroyum, og verða tey brúkt alt ári, tí tey hava jú ongar píkar. Fríðrikur Bláhamar sigur, at hesi eisini eru góð vetrardekk.

Tó eru tey ein falskur tryggleiki, um tey eru niðurslitin, á sama hátt sum tað er við píkadekkum uttan píkar, heldur Fríðrikur Bláhamar.

Hann er júst afturkomin av ráðstevnu uttanlands, har millum annað píkadekk vórðu roynd á ísi. Tá vístu píkadekkini seg at vera nógv tey bestu. Men sum tað so áður ofta er ført fram, er tað ógvuliga sjáldan, at vit hava veruligan ís á vegum okkara. Kavaveður hava vit mangan og tá er tað, at vetrarlamelldekkini við bleytu gummiblandingini eru tey bestu.

### Bót at nýta summardekk

Í øllum tosinum um góð dekk og minni góð dekk, hevur Fríðrikur Bláhamar hug at venda trupulleikanum eitt sindur á høvdið og sigur, at koyra fólk eftir umstøðunum, so eigur einki óhapp at henda.

Spurningurin er so, um fólk koyra eftir umstøðunum, tá tey koyra við summardekkum um veturin? Fríðrikur Bláhamar vísir til Týsklands, har tað er soleiðis hátta við summardekkum um veturin, at gert tú eitt óhapp í hálku við summardekkum, so fært tú eina bót fyri ikki at vera rætt skøddur.

Speiskliga heldur Fríðrikur Bláhamar fyri, at vit í Føroyum eru serfrøðingar í at eftirlíkna tí, sum danir gera, og tá danir altíð eftirlíkna tað, sum týskarar gera, so ganga helst nøkur ár, áðrenn hetta verður galdandi í Føroyum.

### Eftirlýsir havarínevnd

Eitt sum føroyingar tó kundi kopiera frá dønum, og tað ongantíð ov skjótt, er at fáa eina havarínevnd á landi, heldur Fríðrikur Bláhamar. Hann vísir á, at tá eitthvørt hendir á sjógvi, fer beinanvegin ein havarínevnd í gongd at gera eina kanning.

– Hesa havarínevndina hava vit ikki á landi, men tað verið gott. Hvørja ferð eitt óhapp var, so gjørdi havarínevndin sínar metingar, sum kundu vera grundarlag fyri nøkrum hagtølum við ársenda, sigur Fríðrikur Bláhamar, stjóri á Super Dekk.